# Óli – Færøyenes narr




*– Betrakt de to av hans yndlingsobjekter, Anfinn Kallsberg og Høgni Hoydal, i forsidetegningen på Skemt 99, sigur Willy R. Kastborg um hesa tekningina*



*Norski journalisturin, Willy R. Kastborg, ummælir 13. Skemt bókina hjá Óla P*

**– Óli Petersen er den betydelige avistegner. Han er også meget av en journalist. Med sine tekster og lekende ordspill er han en misunnelsesverdig ordets mester skrivar norski journalisturin Willy R. Kastborg m.a. í ummæli sínum av teknilistini hjá Óla Petersen. Hann hevur kagað í tær 13 Skemtbøkurnar, sum Sosialurin hevur givið út, og hevur gjørt sær sínar egnu metingar. Ummælið er við í sjálvari bókini, Skemt 2001. Vit geva norska eygleiðaranum orðið**

Jeg leser setningen en ekstra gang. Jeg ser at det som står der tilsynelatende ikke kan være riktig. Jeg vet at man vil si: Det må være feil.

Hvorfor skriver jeg da: Han tegnet da han ble født?

Og hvorfor lar jeg setningen bli stående?

Jeg lar den stå fordi dens påstand er en umulighet som inneholder en sannhet. Den at vi ikke alene fødes i det minut vi forlater mors liv. Vi fødes ennu en gang. I det første vår hukommelse fanger oppstår vår bevistshets liv. I vår tidligste erindring fødes vi på ny. Hva som er før det er kun et forspill gjemt i mørket.

Óli Petersen sier.

– Jeg har tegnet så langt tilbake jeg kan huske.

Han ble født, og han tegnet.

Intet tyder på at hans tegninger var bedre eller annerledes enn andre barns. Den gryende forståelse av at hans tegneferdighet var større og mer bemerkelsesverdig enn kameratenes kom først i de tidlige skoleår i krigstidens Klaksvik. År preget av sterke opplevelser.

Óli minnes tyskernes bombing av barndomsbyen.

– Vi så de tyske flyene komme lavt inn over byen. I et av dem kunne jeg tydelig se flyveren i cookpiten. De andre barna kastet seg ned i sneen, så jeg gjorde det samme. Jeg så et skip synke på havnen, truffet av en torpedo.

Óli husker de færøyske skip laste ferskfisk, og begynne sin farefulle ferd til England. Han så dem komme tilbake – og så at ikke alle vendte hjem igjen.

– Vi hadde våre helter. Den største av dem var Leif Larsen, den legendariske Shetlands-Larsen. Kanskje fordi han opererte i et farvann som var kjent og nært.

I likhet med de fleste av Færøyenes unge menn den gang måtte Óli til skips etter endt skolegang. Han kom på fiske i disse samme farvann hvor hans helt bidro til å endre krigens gang.

Hans tid som fisker ble kort. Etter et år på Kunst- og Håndverkskolen i København utdannet han seg til teknisk tegner. I en årrække arbeidet han som skipstegner ved Skipasmiðjan á Skála.

Som karikaturtegner er Óli Petersen selvlært. Det begynnte i den Klaksvikutgitte Rukkulakkin i 1958. Fra 1989, og i alle år senere, er hans tegninger å finne i Sosialurin.

Hans tegnekunst har undergått en enorm utvikling fra den første start til i dag. I begynnelsen skiller hans tegninger seg ikke ut fra den store masse av mer eller helst mindre gode avistegninger. De er kvalitetsmessig ujevne og overflatiske. De er lite mer enn rene avbildninger, hvor mennesker og situasjoner har en gjenkennelig ytre likhet. (Óli sier: »Hvis jeg hadde tegnet slik i dag ville jeg sluttet. Jeg har alltid strebet etter å gjøre det bedre. Jeg synes aldri det er godt nok. Men jeg har ingen ambisjoner om at tegningene skal henge på en vegg. Jeg tegner ikke for evighe-ten.«)

Hans humor har alltid vært der. Humoren er vesentlig i alt han skaper. En verden uten humor er utenkelig hos Óli.

Hvor mange av Sosialurins lesere – eller for den saks skyld avisens egne medarbeidere – er klar over hans storhet? Hvor mange forstår at i dette lille, ensomme miljø finnes en kunstner som på sitt beste – og det er ofte – er på høyde med det ypperste i nordisk tegnekunst?!

Hva er det som skaper hans storhet?

Ikke bare at hans faste og kraftfulle strek er karakteristisk personlig. Ikke alene det at tegningene er rammende slagferdige.

Hans storhet finnes i tegningenes indre substans.

De gjengir ikke bare uhyre presist den ytre likhet med personer og situasjoner. De utsier også treffende personenes karakter. De avdekker deres indre personlighet, usynlig for vårt øye. De forteller hvem de er, og hvordan de er.

De beviser at karikaturen er det sanneste av portretter.

Betrakt de to av hans yndlingsobjekter, Anfinn Kallsberg og Høgni Hoydal, i forsidetegningen på Skemt 99. Hoydals røde lue er trukket ned over øynene. Ansiktet er delvist skjult. Den ytre likhet observeres øyeblikkelig. Den er av mindre betydning. Det er først og sist et skarpt sett portrett av et menneskes indre. Det viser en person som skyr virkeligheten. Som blindt lever i fiksjonen av en verden som ikke er. Et menneske som ikke vil og ikke kan se realitetene i øynene. Som alltid vil si: »Jeg har gjort opp min mening. Ikke forvirr meg med fakta.« I andre tegninger ser vi Hoydals ansikt. Det er ansiktet til den ensporede propagandist og ikke-politiker.

Se så på samme tegning Anfinn Kallsberg. Et rundt, vennlig og imøtekommende menneske. En godviljens mann. Men portrettet har i sin altomfattende blidhet en farlig brodd. Mot en leder som alt for meget vil alle vel. Som mangler det nødvendige temperament til å slå i bordet. Til å regjere. En tiltalende godviljens mann, men ikke av det stoff betydelige ledere er gjort av.

Jeg ser på forsiden av det Skemt De holder i hånden. Jeg sier.

– Den kommer de portretterte ikke til å like.

Óli smiler. Han sier med en lun indre tilfredshet.

– De blir rasende.

Er Óli ondskapsfull? Selvfølgelig er han det. Det er i hans tegninger et element av frydefull ondskap. Den rammer ikke personen, men den personifiserte makt.

Han beskyldes for å ha brodden ensidig rettet mot landsstyret og dets partier. Det er riktig. Det er også selvfølgelig. Hans blikk er alltid rettet mot de som til enhver tid er makthaverne. Her står han i en tradisjon som går helt tilbake til middelalderens narr. Óli Petersen er dette samfunns narr. Han er gøgleren som avslører og torpederer maktens pretensiøse dumheter. Narren vet, at intet treffer de ambisiøse og fremadstrebende, de i egne øyne kloke, så hardt som å bli utlevert til latteren. Får de latteren i mot seg er de vergeløse. Da har de tapt.

Har narren selv makt? Selvfølgelig har han det. Han kan påvirke. Han kan endre holdninger og meninger.

Óli Petersen er den betydelige avistegner. Han er også meget av en journalist. Med sine tekster og lekende ordspill er han en misunnelsesverdig ordets mester.

En narr i bilder og ord. En narr som stedig forteller oss at keiseren ingen klær har på.



# Eitt sindur slakari í nøgd

**– Vit landa 1-2 bátar um vikuna. Restin kemur í bili, sigur Albert Ellefsen**

FISKIVINNA

*Vilmund Jacobsen*



*- Vit hava eini 600 tons minni av ráfiski í ár, men gongdin hevur verið á eini leið, sigur Albert Ellefsen, virkisleiðari á Fiskavirking í Miðvági.*

**Miðvágur:** Fiskavirking í Miðvági hevur higartil í ár keypt stívliga 4.200 tons av ráfiski, sum er eini 600 tons minni enn somu tíð í fjør.Albert Ellefsen sigur tó, at gongdin hevur verið á eini leið, og at nógv fiskaarbeiði hevur verið á virkinum.

- Vit hava arbeitt næstan hvønn dag í ár, hóast nøgdin í tølum er eitt sindur minni. Onkur dagur hevur verið, har okkum vantaði nøkur tonsini av fiski, og í síðstu viku var onkur løta, har gólvið var turt. Men, sum heild, hevur nógv fiskaarbeiði verið á virkinum til tey 100 fólkini, sum starvast her.

Albert sigur, at tey hava arbeitt nógvan upsa í heyst, men soleiðis plagar tað ikki at vera hesa ársins tíðina.

- Vit skuldu helst arbeitt hýsu, men nógv hýsa er farin av landinum í heyst, og tí er lítið komið til virkingar í Føroyum. Í seinastu og næst seinastu viku arbeiddu vit tó væl av hýsu, sum fer til portiónir og flak.

Hetta er sama »søgan«, sum Sosialurin fær at vita á Eiði, har tey helst eisini vilja virka hýsu í vetrarhálvuni.

## 1-2 skip um vikuna

Alberg sigur, at nøkur skip hava landað í Miðvági í seinastuni.

- Herfyri høvdu vit línuskipini, Morgunstjørnuna og Sigmund, og trolarin, Vesturvarði, landaði eisini her í síðstu viku. Øll veiðan hjá Vesturvarða fór um telefon-søluna, og tað vóru aðrir, sum keyptu.

Virkisleiðarin vísir á, at fiskakeyparar yvirhøvur liggja fram við á øllum uppboðssølunum kring landið, bæði í Klaksvík, Toftum, Sørvági og í Vági.

- Meginparturin av fiskinum, vit keypa, kemur í bili, men í seinastuni hava 1-2 skip landað her um vikuna.

Spurdur, hvussu gongst at fáa landarar, sigur Albert, at tað gongur.

- Teir, sum landa skipini, eru partvís menn, sum arbeiða á virkinum og

sjómenn, sum eru heima millum túrar, sigur hann.

## Hiva útróðrarfisk fyri uppboðssøluna

Nakrir útróðrarbátar eru í Miðvági, og sum skilst, hava teir fingið fitt av fiski í seinastuni. Men tað hevur ikki viðrað nakað serligt. Teir flestu royna við snellu, onkur við línu.

- Vit taka fiskin hjá bátunum upp her í Miðvági fyri uppboðssøluna í Sørvági; síðan fer fiskurin í bili til Sørvágs. Útróðrarbátarnir í Sørvági landa í Sørvági, og onkur bátur í Miðvági rør út av Sørvági og landar beinleiðis til

uppboðssøluna har.

Albert sigur, at allur útróðrarfiskurin fer um uppboðssøluna, og tað heldur hannvera rætt, tí tá fáa bátarnir tað fyri fiskin, sum marknaðurin gevur fyri hann.

Spurdur, um tað hendir, at útróðrarfiskur, sum kemur upp í Miðvági og verður koyrdur til Sørvágs, aftur kann enda í Miðvági, sigur hann:

- Vanliga endar útróðrarfiskurin ikki aftur í Miðvági, men hava bátarnir hýsu, kunnu vit keypa hana og koyra fiskin aftur til Miðvágs. Men í løtuni royna teir flestu við snellu og tað, teir fáa, er mest gráur fiskur, sigur Albert Ellefsen.

# Frystur svartkalvi á Tvøroyri

*- Vit vænta eitt ávíst arbeiðstrýst undan jólahøgtíðini, sigur Bjarni Hansen, virkisleiðari á Fiskavirking á Tvøroyri.*



**– Øll skipini eru úti, so vit vænta eitt ávíst trýst undan jólum, sigur Bjarni Hansen, virkisleiðari**

FISKIVINNA

Vilmund Jacobsen

Á Fiskavirking á Tvøroyri ætla tey ikki at helma í fyrr enn fríggjadagin, 20. desember.

Bjarni Hansen, virkisleiðari, sigur, at øll skipini eru úti, og tað merkir, at arbeiðsfólkið kann vænta sær eitt ávíst trýst undan jólum.

- Men hetta er tað vanliga undan jólahøgtíðini, sigur hann.

Fyrstur inn at landa verður helst djúpvatnstrolarin, Rankin, sum ætlandi kemur nú hósdagin. Í hvørji røð, hini skipini annars koma, dugir Bjarni ikki at siga í løtuni.

## Landaðu fyri Fiskamarknaðin

Í síðstu viku løgdu tveir djúpvatnstrolarar og tvey garnaskip veiðina upp á Tvøroyri.

- Brestir var inni við 120.000 pundum og Steintór við 104.000 pundum. Teir høvdu fleiri sløg av fiski, eitt nú tosk og upsa. Vit landaðu eisini garnaskipini, Nim og Ólav Hvíta, sum høvdu umleið 14.000 pund av havtasku í part.

Bjarni sigur, at teir landaðu hesi skipini fyri Fiskamarknaðin og keyptu ein part av veiðini. Onnur virkir keyptu eisini.

- Tað er vanligt, at virkir landa fyri Fiskamarknaðin og keypa sjálvi tað, sum tey hava brúk fyri ella kunnu fáa fatur á i kapping við aðrar, sigur hann.

## Frystur svartkalvi

Hesa vikuna hava tey arbeitt frystan svartkalva á Tvøroyri, og tað gera tey av og á, skilst.

Spurdur, hvaðani hesin fiskurin kemur, sigur Bjarni, at hetta er frystur svartlakvi, sum tey hava keyp frá útlendskum skipum.

- Tað er ikki soleiðis, at vit frysta svartkalvan, sum føroysku ísfiskaskipini koma við; hann verður beinanvegin skorin til flak. Men av og á keypa vit frystan svartkalva frá útlendskum skipum. Hesin verður so framhaldandi frystur og er góður at taka til, tá ið minni er av øðrum. Á henda hátt fylla vit tey »tómrúmi«, sum kunnu stinga seg upp og framvegis hava støðugt arbeiði til fólkið.

Bjarni Hansen sigur, at tað ber væl til at tiðna svartkalva uppaftur og skera hann til flak.